


*- Vit kundu hugsað okkum innrætta bátin til stuttleikabát, og so bjóða teimum ferðandi út at fiska, sigur Martin Dam*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

seymaði til bátin. Annan pening skuldu vit ikki gjalda í fyrstu syftu. Tá vit fóru at fiska, skuldi bátsparturin gjalda okkum bátin.
Tá báturin var liðugur, varð hann mettur at kosta 7000 kr. Hans Debes í Havn metti hann.

## Ráfiskur

8. mars 1907 var tann stóri dagur hjá okkum, tá hetta far, sum vit høvdu stríðst við at byggja, fór á sjógvin, og var tað ein gleðilig stund at síggja farið flóta á vágni.
Navnið, vit góvu bátinum var "Royndin Fríða", uppkallað eftir skipi Nólsoyar Páls.
Vit róðu so út við "Royndini" um várið norð á hav. Sama summarið fóru vit til Íslands við bátinum at fiska. Vit býttu fongin soleiðis, at báturin fekk aðra helvtina og manningin hina. Báturin helt útgerðina, olju, línu og tílíkt, meðan agnið fór av óbýttum.
Tvey tey fyrstu árini, vit róðu út við "Royndini" frá Klaksvík avreiddu vit í ráfiski, men fyri at fáa meira burturúr, fóru vit seinri at selja í saltfiski.
Statslánið, vit høvdu fingið, var til at gjalda aftur í 10 ár. Á nýggjárinum 1917 skyldaði báturin 1300 kr. Tá várróðurin var lokin hetta sama ári, vóru hesar 1300 kr. goldnar. Harumframt var eitt avlop uppá 800 kr., sum vóru býttar soleiðis, at hvør av teimum seks eigarunum av bátinum fingu 100 kr. og 200 kr. vóru settar inn at hava at taka til. Vit guldu sum sagt 25 kr. hvør, tá báturin varð gjørdur. Vit høvdu heldur ikki lagt pening út til bátin hesi árini. Men nú, tað fyrsta árið, ið vit býttu av avlopinum, nú báturin var goldin og soleiðis til fulnar okkara, fingu vit 100 kr. í part.

## Avlop

Í 1917 seldu Jákup bóndi og Napoleon á Biskupsstøð sínar partar til J. F. Kjølbro, og í 1918 seldu Heina-Símun og Símun Jens ogn sína í bátinum til J. F. Kjølbro.
Í 1919 og í 1920 var avlopið av bátspartinum 1800 kr. hvørt árið, so tað gav 300 kr. til hvønn sættapartin.

> *Jákup bóndi hevði longu hugsað um tilfar og hevði hann kjøl og stevni úr einum gomlum skipi hjá handlinum í Klaksvíkini. Tað var av skipinum "Sylviu", sum átti at koma til Føroya um 1890, men hevði vist ikki verið brúkt til fiskiskap. Tað segðist, at skipið var um hundrað ára gamalt, tá tað kom til Føroya, so at tað var ikki nýtt tilfar at leggja til kjøls*

## Pláss við Müllersbrúgv?

Í dag liggur Cameron við bryggjuna inni í Kaldbaksbotni. Spurningurin er tó, um hetta er tað rætta staðið fyri eitt so søguligt skip sum hetta.
Í Tórshavnar kommunu verður í løtuni arbeitt við at gera eina heildarætlan fyri alt økið við Skálatrøð, og her hoyrir umhvørvið við Müllersbrúgv eisini uppí.
Við hesa brúgv liggur longu nú eitt søguligt skip, sluppin Westward Ho.
Fyri Martin er eingin ivi um, at elsta skipið sum er bygt í Føroyum, eigur at hava sítt natúrliga pláss í hesum umhvørvinum.
- Eg haldi, at Cameron hevði hóskað væl í hesum umhvørvinum, sigur hann avgjørdur.

Tá eg í 1920 helt meg vera ov gamlan til at fáast við javnan útróður, helt eg við tann sonin, sum var heima, at um hann vildi taka við, so dámdi mær tað best. Tað helt hann ikki, og við tað at eg sjálvur ikki hevði hug at vera við til at dríva bátin longur, seldi eg J. F. Kjølbro part mín, og Julius á Biskupsstøð seldi eisini sín part.
– Og høvdu vit nú allir latið bátin frá okkum, endar Elduvíks-Jógvan frágreiðing sína.

Sosialurin